# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 18. nov. 2010

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 18.10.

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat, hetta varð játtað og koma tey inn sum mál nr. 5 og 6 á skránni.

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Bóltfelagnum Royn.**
   Samtykt varð at Trivnaðarnevndin kemur at seta seg í samband við tey viðv. stuðli til felagið.

2. **Umsókn um stuðul frá Dansistovugaman til mentunartiltak í Trongisvági.**
   Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 3.000,-.

3. **Onnur viðgerð av fíggjarlógini fyri 2011.**
   Útreiðslurnar til rakstur eru settar til kr. 16.826.073,- og íløgurnar eru settar til kr. 10.600.000,-. Samtykt varð, at skattaprosentið framhaldandi verður 20% og barnafrádrátturin kr. 5.000,-. Roknað er við einari skattainntøku á kr. 16.328.851,-. Fíggjarætlanin varð samtykt uttan viðmerkingar.

4. **Fyrsta viðgerð av eykajáttan fyri 2010.**
   Umsóknin um eykajáttan varð gjøgnumgingin og ljóðar uppá kr. 602.000,-. Samtykt varð at taka undir við umsóknini um eykajáttan.

5. **Skriv frá Hagapartinum Suðuri í Haga viðv. leigusáttmálanum.**
   Samtykt varð at góðtaka sáttmálan.

6. **Umsókn til verkætlanina "Grøn multihøll á Oyrunum" í Vági.**
   Søkt verður um stuðul til verkætlanina uppá kr. 100,- pr. íbúgva í 2011 og tað sama í 2012.
   Samtykt varð at stuðla verkætlanini við uml. kr. 70.000,- pr. ár.

7. **Kunning um mál beind í nevnd síðani síðsta fund.**

8. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund:**

9. **Ikki alment mál.**

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 21.00.